Kaldbak 16. mei 2024

**Notat um alduávirkan av skipaferðslu á økið við Kvørnina, undir Gøtueiði**

Hvørnin myndar ein hóp av størri og minni klettum. Út frá landi dýpist skjótt niður á uml 4 metra dýpi. Talan er um klettabúlendi, sum dýpist skjótt niður á uml 4 metra dýpi, har miðalgrovur skeljabotnur tekur við.
Skipaferðslan útfyri Kvørnina førir við sær at aldur frá skipum raka búlendið. Aldusávirkanin er tengd at stødd (deplacement) og ferð hjá hesum førum. Væntast kann at havnarmynduleikin fer at áseta 4 míl sum hægst loyvdu fer hjá skipunum, sum leggja at og frá eini møguligari havn umleið 200 metrar innanfyri Kvørnina.

Verkfo hevur latið uppsjóvarskipið Gøtunes (4624 bruttotons) sigla fram við við 4 mílaferð (filmsbrot 0-3) og 6-7 míla ferð. (filmsbrot 4).

Filmsbrotini vísa alduávirkanina inni við sjóvarmálan í økinum við Kvørnina. Við 4 míla ferð inn eftir fjørðinum, er ávirkanin at rokna sum blídligt alduskvatl, sum ikki brýtur stórvegis frá natúrliga alduskvatlinum (filmsbrot 3). Við 6-7 míla ferð út eftir fjørðinum er aldan frá Gøtunes valla sjónlig tá hon rakar strondina (filmsbrot 3). Alduávirkanin fellur skjótt við dýpinum.

Livni við Kvørnina verður javnt og samt rakt av aldu av natúrligum ávum, sum tíðum er væl størri enn tær, sum Gøtunes ger í filmsbrotunum.
Eg vildi mett at flestu skipini sigla framvið við eini frástøðu frá Kvørnini uppá uml 200 metrar. Við støði í filmsbrotunum, meti eg ikki at livni í sjóvarmálanum og niðanfyri vatnskorpuna, nervast av skipaferðslu, sum víst verður í filmsbrotunum.

Ámundur Nolsø

Keldur:

Filmsbrot 0:
https://photos.google.com/share/AF1QipMzPrVjqTX1farDAmyt2BStwsPg8pzDba6xmHi173h-Y3HPFMzQAUN1pqW5J8yAiw?key=dXdrczJIWDBHQ0tORVVzOUxGSzRYYTV6Mmp0eE1R

Filmsbrot 1:

https://photos.google.com/share/AF1QipP7XmZK6XPLMgVGkJEjiaO3QsFUSgvcc2HrfuvCOivNjh47I5ieYOuUQW8cAHFDxQ?key=SjByeHBtUHlYUGZGV0hTRlpBSDJwY09YamVJc05n

Filmsbrot 2:

https://photos.google.com/share/AF1QipN0cF_qCvE-P8YqcDx32YC6nbrQtpi2xWb2hUae42G3tEZ68zlYjT0LVdGfgBwOWg?key=U29KeGtTaXB4SDZFeFdXREZHc01HdmZnY1Q1WDZB

Filmsbrot 3:
https://photos.google.com/share/AF1QipOtt0PcqdKOMKpUuraSwhtoUdgWqY4wj2DtXyyWkSiPj2su4E3d_nBec8xu1hj6oA/photo/AF1QipMSd5pyfGBCGTIpvofOlh69q8jmrO6cNenBpKxA?key=bjdEYnJVbE9ZRVlZYWdGRW9tVDN3ZUVvYXpmdWhB

Filmsbrot 4: https://photos.google.com/share/AF1QipOjxiqtz05f4ByqR0SRVLf-XBXxo39hgwwqfpSx8klLAtPbwumHvD_MdRPmIIZWyg?key=dHd2a0lmYjd2aDBqLXRvZ19RT2lkX1VnbTVvWkV3